# Beckham fekk 12 min.

32 ára gamli David Beckham spældi sín fyrsta dyst fyri LA Galaxy sunnudagin. Hetta hendi, tá nýggja felag hansara spældi venjingardyst móti Chelsea. Ivi hevði annars verið um, hvørt Beckham fekk spælt við í dystinum, nú hann hevur drigist við ein skaða í dýru fótliðunum, men teir 27.000 áskoðararnir fingu so tað, sum teir komu eftir. Eisini hóast stóra stjørnan ta einu ferðina venaði seg, tá hann hevði fingið eitt spark inn á eyma økulin. Chelsea vann annars dystin 1-0 við einum máli, sum John Terry skoraði.



# Milliard til tey næstbestu

Enska Premier League fer komandi árini at handa á leið eina miliard krónur til liðini í lægru deildunum. Hetta er greitt, nú samráðingarnar um ein "solidaritetspakka" millum liðini í Onglandi eru lidnar. Nýggi sjónvarpssáttmálin hjá Premier League gevur fremstu feløgunum eina meirinntøku á £ 2,7 milliardir, og av hesum verða tær £ 90 milliónirnar sendar víðari til smærru feløgini. Hetta við tí endamáli, at feløgini í Football League eisini fáa fíggjarligar møguleikar at menna sítt arbeiði.

# Dreingirnir vunnu kappingarnar

**Bæði U15- og U17-landsliðini í fótbólti vunnu finaludystirnar, tá Føroyar tóku lut í Aberdeen Football Festival**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Leygardagin spældu føroysku U-landsliðini í Aberdeen finaludystir í altjóða fótbóltskappingini, sum hevur verið har seinastu dystirnar. Hjá dreingjum vóru bæði liðini við í finalunum, og í báðum førum gjørdist talan um føroyskan sigur.



*Talan var um eina fína kapping, har føroysku liðini í flestu dystunum veruliga fingu roynt seg. Og har tey at enda eisini komu heim við tveimum gullmerkjum*

*Mynd: www.football.fo*

### Teitur var hetjan

Hjá U15-liðnum var stóra hetjan málverjin, Teitur Gestson Matras. Hann helt fyrst og fremst málið reint, og tað er jú ein týðandi uppgáva hjá einum málverja. Men sum um hetta ikki var nóg mikið, so varð hann eisini matchvinnari hjá føroyska liðnum. Hetta, tá Føroyar tíðligaí seinna hálvleiki fingu brotsspark, og tað setti málverjin trygt í netið.

Finaludysturin varð spældur móti Aberdeen, sum hevur eitt av sterkastu skotsku ungdómsliðunum. Skipanin í skotskum fótbólti er so, at bestu spælararnir innan skúlafótbóltin verða savnaðir á ymsum úrvalsliðum, og teir bestu úr hesum liðum fáa so aftur møguleikan hjá veruligu feløgunum.

### Bastu Dundee

Hjá U17-liðnum var tað Dundee, sum var mótstøðuliðið. Eins og hjá U15, so var her talan um eitt av sterkastu skotsku liðunum innan ungdómsrøðirnar, men hetta tóktist tó ikki nerva føroysku spælararnar nakað serligt.

Eftir bert fimm minuttum hevði Róaldur Jacobsen skotið Føroyar framum, og tann støðan helt sær nakað væl inn í seinna hálvleik. Tá javnaði Dundee, men Føroyar fullu ikki í fátt, og tíggju minuttir fyri leiklok avgjørdi Heini Vatnsdal dystin.

### Ikki loyvi til finalu

Eisini hevur U17-liðið hjá kvinnum tikið lut í kappingini. Her stóð tó greitt undan kappingini, at talan ikki skuldi verða um finaludyst, tí føroyska liðið hevði onkrar spælarar, sum ikki luku aldursmarkið í kappingini.

Tað forðaði tó ikki fyri fleiri góðum venjingardystum, og tann seinasat av hesum vunnu okkara gentur eisini. Hetta við ikki minni enn 5-0 sigri á East End. Føroysku málini skutu Kristinbjørg Frederiksberg, Mona Breckmann, Lisa í Liða, Elin Holm og Ása Klakstein.

# Vil hjálpa KÍ

**Nýggja álopsessið hjá KÍ staðfestir, at hann fyrst og fremst ætlar at hjálpa KÍ longur upp eftir stigatalvuni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Fríggjadagin stóð greitt, at KÍ hevur styrkt sær um álopið undan seinnu kappingarhálvu í Formula-deildini. Talan er um 31 ára gamla Denni Conteh, ið áður hevur spælt sum yrkisspælari í Fraklandi, Hollandi og Danmark.

- Mítt mál verður at hjálpa KÍ longur upp á stigatalvuni, sigur nýggi KÍ-álopsspælarin, Denni Conteh.

- Eg havi hoyrt sera nógv gott um Føroyar, so eg gleði meg at koma til Føroya at spæla fótbólt. Eg kenni ikki so nógv til føroyskan fótbólt, men mítt mál verður at hjálpa KÍ longur upp á stigatalvuni, sigur Denni Conteh við heimasíðuna hjá KÍ.

Nevndarformaðurin í sp/F KÍ, ið rekur Formulaliðið hjá KÍ, fegnast um avtaluna við danska álopsspælaran.

- Vit eru fegnir um, at vit hava fingið ein royndan álopsspælara, sum hevur spælt á hægsta stigi uttanlands. Hetta er ein styrkur til liðið her og nú, og samstundis arbeiðir leiðslan í felagnum við at finna varðandi styrk til Formulaliðið fram ímóti næsta kappingarári, sigur Aksel Johannesen.

# Liðugt við ávaringum

**Samstundis sum hann súkklar í gulu troyggjuni í Tour de France, flúgva doping-ákærurnar um oyruni á danska Michael Rasmussen**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Nú komið er til Pyrineirnar tykist Michael Rasmussen veruliga at prógva sína styrki. Men samstundis harðna doping-ákærurnar móti honum alt meira*

*Mynd: Polfoto*

Við ikki at fráboða, júst hvar hann er staddur, hevur danski Michael Rasmussen fýra ferðir fingið ávaring frá dopingeftirlitinum.

Altjóða reglurnar á økinum siga, at um súkklari tríggjar ferðir ávaring fyri ikki at røkja fráboðanarskyldu sína, so verður málið roknað sum dopingmál, men har til er tað so enn ikki komið hjá Kylling, sum Michael Rasmussen verður róptur. At málið ikki er reist enn, kemst av ógreiðu reglunum á økinum, har tað ikki stendur staðfest, hvaðani ávaringarnar skulu koma. Soleiðis hevur Rasmussen fingið tvær ávaringar frá altjóða dopingeftirlitinum og tvær frá danska dopingeftirlitinum.

Í prinsippinum snýr reglan seg um, at súkklarar tvær ferðir um árið boða frá, hvar teir eru at hitta næsta hálva árið. Hetta ber sjálvandi illa til í praksis, og júst tí er talan um stranga fráboðanarskyldu, tá ætlaða mynstrið annars verður brotið. Ein fráboðanarskylda, sum flestu súkklararnir ikki hava stórvegis trupulleikar av, men sum Kylling altso ikki hevur hildið.

Týdningarmest av øllum, so er Rasmussen ikki testaður positivur, og tí er hann framvegis partur av stóru súkklukappingini. Men ein av fyrrverandi vinum hansara staðfesti fríggjdag, at Rasmussen á sinni vildi lokka seg at smugla ólóglig evni.

Whitney Richards sigur, at Michael Rasmussen ta einu ferðina bað seg taka eitt par av súkkluskóm við til sín. Men heldur enn bara at taka eskjuna, so vildi Richards spara pláss í kuffertinum, og tí opnaði hann eskjuna. Og sjálvur sigur hann, at hendan als ikki innihelt skógvar, men fleiri sløg av heilivági.

Eg koyrdi alt, sum var í eskjuni burtur, og síðani spurdi eg Michael, hvat hetta var fyri nakað. Tá gjørdist hann frá sær sjálvum, og spurdi meg, um eg visti, hvussu nógv hetta lortið kostaði, sigur Richards.

Sjálvur vil Michael tó ikki kennast við nakað av hesum. Hann heldur framvegis fast um, at hann ikki nýtir doping í sínum royndum at vinna seg fram millum bestu súkklararnar í heiminum.